# Stigin

*Anni Helena Lamhauge*

"Satans!", banni eg, eftir at hitin frá ovninum brendi mín lógva ígjøgnum lappan, meðan eg royndi at turka havragreytin burtur, sum eg av óvart stoytti við síðuna av skálini, áðrenn hann festi seg í kókiplátuna. Eg seti skálina á køksborðið og byrji at eta. Eg eri ikki vísur í, um tað er tí, eg brendi havragreytin, ella tí eg keypti tann bíligasta pakkan av havragrýnum á hillini, men eg oysi eitt fjall av kanelsukri fyri at fjala tann ótespiliga smakkin í munninum. Tá eg eri liðugur at eta, hyggi eg at klokkuni og minnist, at framsýningin á listasavninum byrjar um 20 minuttir. Eg skundi mær inn á kamarið og finni tey penastu klæðini, eg eigi. Eg hyggi í speglið og síggi eitt stórt hol undir ermuni. Hóast hetta, lati eg meg í ein jakka út yvir, so holið ikki sæst.

Eg klamsi hurðina eftir mær og seti ferðina upp fyri at náa framsýningina til tíðina. Har eru færri fólk á listasavninum, enn eg væntaði. Tann væl umtókti og impressionistiski listamaðurin, P. Saprano, er komin úr Sveis at vísa sína list í Føroyum. Tá ið eitt so mikið stórt navn vitjar eitt so mikið lítið land, væntar mann at síggja fleiri fólk enn tey tjúgu, sum standa og bíða við høvuðsdyrnar. Hurðarnar verða opnaðar, og ein kona tekur ímóti okkum. Flestu av listaverkunum, sum hanga á veggjunum, hugtaka meg ikki nakað serligt. Men brádliga við endan á framsýningini síggi eg eitt tað mest sjáldsama listaverkið, eg áður havi sæð. Ein stigi. Í eina løtu eri eg tann einasti, sum stendur og hyggur at verkinum. Við flestu listaverkini standa meir enn ein persónur og hyggja. Men eg standi einsamallur, inntil ein kona stillar seg hinumegin stigan. Hon er íklødd eina reyða blusu og ein svartan niðurdeil, sum fær meg at føla meg illa um mína holutu blusu. Vit fáa eygnasamband tvørtur um stigan, og hon smílist til mín. Eg smílist aftur og føli eina kenslu av hita innan í mær. Vónandi sær hon meg ikki rodna. Eg hyggi aftur at listaverkinum og geri mær nakrar tankar um, hvat ein stigi møguliga umboðar. Tað fyrsta, eg hugsi um, er arbeiðið hjá mær sum skrivstovufólk. Í hesum yrkinum verður mann noyddur at arbeiða fyri at standa ovast á stiganum. Eg havi arbeitt á mínum arbeiðsplássi í 5 ár nú, men eg eri enn ikki komin hægri á stiganum og fingið meiri ábyrgd. Eg hevði ynskt, at eg kundi givið stjóranum hjá mær skyldina fyri ikki at geva mær fleiri møguleikar. Tó er sannleikin nokk tann, at eg ikki dugi at grípa teir møguleikar, eg fái. Eg havi havt fleiri starvsfelagar, sum langt síðani hava fingið betri størv, tí tey dugdu at spyrja. Ein útssaligur tápulingur, sum ikki dugir at standa andlit til andlits við sínar avbjóðingar. Eg eri meir ein duramotta, enn eg áður fari at vera maður. Eg hyggi aftur at stiganum og geri av, at eg skal byrja at klintra á mínum stiga. Eg vil ikki vera ein duramotta, eg fari at taka ræði á mínum lívi, og mánadagin fari eg at snakka við stjóran hjá mær.

Tá ið eg hyggi upp aftur, er eitt eldri par komið til stigan. Konan sær út til at vera bergtikin av stiganum, eins og eg var í áðni. Maðurin, sum ikki sær út til at leggja líka nógv í listina, geispar og hyggur aðrastaðni. Eg síggi eyguni hjá gomlu konuni fyllast við tárum. Meðan eitt tár trillar niður, hyggi eg at konuni í reyðu blusuni. Vit fáa eygnasamband aftur, og eg dugi at síggja, at hon eisini sá tárið. "Hvat man stigin umboða fyri ta gomlu konuna?", hugsi eg fyri meg sjálvan. Hon er gomul, so tað fær meg at hugsa um trappurnar til himmals. Kanska hon júst hevur mist onkran. Og tann persónurin er klintraður gjøgnum stigan til himmals. Eg havi umsorgan fyri henni. Eg kenni meg aftur í hasum kenslunum og minnist aftur á, tá eg var tannáringur og mamma lá deyðasjúk. Eg geri avtalu við meg sjálvan, at eg skal ringja til pápa mín, sum eg ikki havi tosað við í longri tíð, tá eg komi heim.

Tað legst spakuliga afturat bólkinum av fólki, sum hyggja at stiganum. Fyri tað mesta eru tað bara fólk í tretivunum og eldri. Tó eru nøkur undir tjúgu. Ein ung genta, sum sær út til at vera eini sekstan – seytjan ár, er í litføgrum klæðum, stendur í sínum egnu tonkum. Man stigin merkja nakað fyri hana? Tá eg var sekstan, hugsaði eg ikki um annað enn telduspøl og at taka mær av løttum. Men unga gentan sær út til at hava djypri tankar, enn eg hevði sum unglingi, og fyri so vítt eisini í dag.

Fólkini um stigan síggja øll hugsanarsom út. Nøkur smílast, og onnur eru álvarsom. Og eg hugsi við mær sjálvum, at fólk reagera upp á list á hvør sín hátt. Tey øll hava sínar egnu tankar og egnu kenslur um hendan stigan. Tey eru síni egnu og ikki bara eykapersónar í mínum lívi. Eftir hesa sýningina fara tey øll heim til sítt egna lív og sín gerandisdag. Tað eldra parið fer allarhelst heim at gera sær døgurða og seinni at spæla gekk, sum tey hava gjørt fast tey seinastu árini. Tann unga gentan hevur allarhelst ætlanir og fer í býin við sínum vinfólki í kvøld. Og vónandi sigur daman í reyðu blusuni ja til at fara til kaffimunn ella øl við mær seinni í kvøld.

Aftanfyri hoyrast fótafet nærkast. Ein húsavørður trokar seg millum fólkini. Hann tekur stigan og gongur spakuliga frá fjøldini. Røringur kemur í fjøldina, sum spakuliga fer hvør til sítt, sum um hendan løtan ikki hendi. Og eftir standa eg og daman í reyðu blusuni, og bæði hyggja niður, eitt sindur smæðin yvir tað, vit júst hava verið vitni til. Vit smílast til hvørt annað, og eg gangi spakuliga ímóti henni...